## Chelsea fingið nýggjan venjara

Tað kom ikki óvæntað á, tá ið Chelsea í morgun boðaði frá, at Carlo Ancelotti verður nýggjur venjari í felagnum. Søgurnar hava gingið um hetta í ensku miðlunum í fleiri vikur, og nú er tað so váttað alment av Chelsea. Chelsea segði í farna kappingarári venjaran Luiz Felipe Scolari úr starvi, og Guus Hiddink røkti starvið fram til summarsteðgin. Carlo Ancelotti er 49 ára gamal. Hann hevur vant feløg sum Reggiana, Parma og Juventus, og seinastu átta árini hevur vant italska stórfelagið AC Milan. -Carlo hevur ígjøgnum langa tíð víst síni evni at skap alið, sum fáa úrslit, og sum kunnu spæla um meistaraheiti bæði í heimligu kappingini og í europeiskari kapping, sigur Chelsea á heimasíðu sínari.



## Silkeborg var heppið

Silkeborg hevur í løtuni beina kós móti uppflyting í bestu donsku fótbóltsdeildina. Felagið, sum er oddalið, hevur í løtuni sjey stig niður til triðja plássi, og tveir dystir eru eftir at spæla. AB, sum er nummar trý, hevur tó ein dyst til góðar. Í gjár eydnaðist tað Christian Holst og liðfeløgunum at vinna við 2-1 á útivølli móti Næstved. Rajko Lekic skeyt bæði málini hjá gestunum. Heimaliðið minkaði um leiðsluna, tá eitt gott korter restaði í av dystinum. Men hóast áhaldandi trýst seinastu løtuna, eydnaðist tað ikki at fáa útjavnandi málið. Christian Holst var innskiftur, tá 74 minuttir vóru leiktir.

# FINA vil sleppa av við superdraktirnar

**- Vit eru her til at skera krabbameinið burtur, segði FINA ovastin Cornel Marculescu hósdagin við fjølmiðlafólk á Palace Hotel í Lausanne. Tekniska nevnd í altjóða svimjisambandinum møttist herfyri endurviðgera støðuna viðvíkjandi nýggju superdraktunum**

SVIMJING
*www.svimjing.com*
*post@sosialurin.fo*

Trupulleikin við superdraktunum er í veruleikanum ikki nakað nýtt mál, men heldur eitt sum er komið sníkjandi inn á svimjingina, áðrenn reglurnar kundu verja fyri tí. Svimjingin hevur altíð havt greiðar reglur um at svimjarin ikki má nýta til dømis fitjur ella flótiamboð til at betra um svimjievnini, men hevur ikki vart nóg væl ímóti at sjálv draktin kundi gerast eitt amboð, ið betraði um svimjaran.

Og tí sóu vit fyrst í hesu øld draktir sum kleimdu vøddar og bróst og líknandi inn, til at minka um vavið á svimjaranum, á størri og størri parti av kroppinum. Reglurnar siga at draktin skal vera í einum, og úrslitið gjørdist tí ein heildrakt, sum gekk heilt út á øklar og handlið. Og nú svimjarin dekkaði allan kroppin allíkavæl, so hildu framleiðararnir at teir tað sama kundi royna at eftirgera náttúruna, við at geva svimjarunum hála húð sum hvalir, ella rúruta sum hávar.

### Speedo LZR Racer broytti alt

Hesar fyrstu draktir verða í dag hildnar at bara optimera evnini hjá svimjaranum, meðan tær nýggju superdraktirnar hinvegin eitast at geva meira enn hvat svimjarin náttúrliga hevur í sær. Fyrsta veruliga superdraktin var Speedo LZR Racer, framleidd við hjálp av vísindafólki hjá NASA, sum við hjálp av óelastiskum reimum um miðjuna styðjar svimjaran so væl, at hann fær lættari við at halda beinunum uppi í vatnskorpuni, og harvið flóta betur. Hartil formar hon kroppin við hjálp av óelastiskum evnum, so at til dømis sneiðingin frá lendum til afturpart verður meira líðandi, og vatnið tí lættari fær farið framvið og uppum svimjaran.

Hendan draktin kom á marknaðin stutt upp undir Beijing, og átti tá meira ella minni allan heimsmarknaðin, inntil aðrir framleiðarar sum til dømis BlueSeventy og Jaked komu við draktum ið toygdu reglurnar enn meira. Teir fóru nevniliga undir at brúka Neopren í draktunum, sum er sama evnið sum verður brúkt til at framleiða vátdraktir við, og sum fólk væl vita flýtur. Men teir brúktu tað sjálvsagt í so lítlan mun, at tað gekk undir reglurnar hjá FINA, og tí ikki kundi forbjóðast.



*Spanski Rafael Muñoz Pérez í Jaked drakt á EJM í Rijeka í desember. Hann setti seinni heimsmet í 50 metra firvald, í hesi kontroversiellu flótidrakt*

### FINA sigur stopp

Støðan gjørdist tí, at tað í vár var serliga Jaked draktin sum var á øllum teimum svimjarum ið settu heimsmet, og svimjiheimurin byrjaði tí av álvara at tala at. Hesar nýggju draktir eru sum heild ógvuliga dýrar og viðbreknar, og uttan stýring fóru draktirnar so líðandi niður gjøgnum aldursbólkarnar. Og tí sóu vit millum annað á Føroyameistarastevnuni í vár, at flest allir finalistar valdu at gjalda fleiri túsund krónur fyri eina drakt, sum kanska helt til FM og eina stevnu afturat. Longu í desember í fjør kallaðu serfrøðingar evropameistarastevnuna fyri eina 'farsu', har eingin kundi gera seg galdandi uttan drakt. Og FINA íverksetti tí í januar eina tilgongd, til at fáa stýring aftur á støðuna viðvíkjandi superdraktum.

Allar draktir skuldu tí latast inn til eftirkanningar tann 31. mars, líka mikið um tær høvdu verið góðtiknar fyrr ella ei, og tann 19. mai kom so út ein listi frá FINA yvir góðkendar draktir, har Speedo LZR draktin yvirlivdi, meðan kappingarneytarnir BlueSeventy, Jaked og Arena mistu síni bestu boð uppá superdraktir. BlueSeventy og Jaked eru bæði bílligari og haldbærari enn Speedo LZR draktin, og hartið er Speedo ein av høvuðsstuðlunum hjá FINA, og svimjiheimurin hevur tí meira ella minni staðið í einum roki, síðani tá. Til FINA nú á fundi í Lausanne meldar út, at ætlanin altso upp á sikt er at sleppa av við allar superdraktirnar, so at svimjingin aftur kemur at handla um svimjarar, heldur enn um útgerð.

Støðan er í løtuni, at FINA forbjóðar draktum sum á einhvønn hátt fær svimjaran at flóta betur, annaðhvørt beinleiðis við at vera gjørd av evni sum flýtur, ella óbeinleiðis við at fanga luft millum svimjara og drakt. Hartil settu tey tann 31. mars forboð ímóti at kunna brúka fleiri av hesum superdraktum í senn, til at umganga at svimjarar tann vegin fóru uppum ólógliga markið fyri flóting. Og frá 1. januar 2010 er so ætlanin at fara at forbjóða eisini 'kompressiónini', sum er tað at svimjarin verður kroystur saman, og styrktur við bardunlíknandi skipanum tvørtur um miðjuna. Tá verður mest sannlíkt eisini Speedo LZR draktin forbjóðað, í øllum førum í tí líki sum hon er nú, umframt tær TYR draktir sum Pál Joensen hevur brúkt í seinastuni.

### Føroysku svimjararnir ongan trupulleika

Men í løtuni hava føroysku svimjararnir ongan trupulleika, við tað at teir flestu av teimum brúka Speedo ella TYR, sum eru og allatíð hava verið góðkendar draktir. Onkur einstakur svimjari hevur klárað oyggjaleikakravtíð í BlueSeventy, og onkur hevur eisini sett met í eini Jaked drakt; men sum heild er talan um svimjarar ið svimja líka skjótt í eini Speedo ella TYR. Og føroyski hópurin hevur tí minst líka góðar vánir nú til Oyggjaleikir, EJM og HM, sum áðrenn góðkenningarlistin hjá FINA kom út tann 19. mai. Tí tað kann jú hugsast, at onkrir av okkara kappingarneytum hava klárað sínar tíðir í BlueSeventy ella Jaked, sum ikki eru loyvdar nú.

## 32 heiðursmerki í væntu

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sambært styrkismetingini skulu føroyingar rokna við 13 gullheiðursmerkjum í svimjing á Oyggjaleikunum á Álanda

Føroyingar luttaka í 47 einstaklingakappingum og níggju liðsvimjingum, og eru í løtuni styrkismett at vinna heiðursmerki í 32 einstaklingakappingum og øllum liðsvimjingum. Tað vil siga, at vit kunnu vænta okkum vinna heiðursmerki tvær ferðir fyri hvørjar tríggjar ferðir ein føroyingur kappast, og hvørja ferð tá ið eitt føroyskt lið kappast.

Sambært núverandi startlista vinna vit tí 13 gullheiðursmerki, 14 silvurheiðursmerki og 5 bronsuheiðursmerki í einstaklingakappingunum, umframt at okkara svimjarar koma í 10 einstaklingafinalur afturat. Av gullmerkjunum er Pál Joensen styrkismettur til seks gull.

Og hartil koma so tær níggju liðsvimjingarnar, har vit vegna væntandi tilmeldingartíðir ikki hava nakra beinleiðis styrkismeting, men út í frá einstaklingavánunum kunnu vænta at vinna heiðursmerki í øllum. Tað er nevniliga so, at okkara svimjarar liggja til at vinna heiðursmerki í øllum einstaklingakappingunum á 50 og 100 metra teinunum uttan 100 bringu.

Talan er um ein breiðan hóp av óvanliga góðum føroyskum svimjarum, sum allir uttan undantak liggja til at vinna heiðursmerki í onkrari einstaklingakapping. Sjálvt tær báðar yngstu 13 ára gomlu, Birita Debes úr FLOT og Poula Ø. Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, sum í 50 rygg liggja til at vinna ávíkavist gull og silvur. Men størsta vónirnar eru sjálvsagt til Pál Joensen, sum er styrkismettur at vinna einar 6 gull og 6 silvur sum einstaklingur, og sum væl kann hugsast at gera minst 1 silvurheiðursmerki afturat til gull.